


**_Nr. 21_** **_14. oktober 2018_** **_78. árg._**

# Broyt tað, tú kanst

*Tá man andi Harrans koma yvir teg, so…*
*tú verður annar maður. 1. Sám. 10,6.*

Joni Eareckson Tada, sum var ógvuliga rørslutarnað, vitjaði einaferð á einum røktarheimi eina kvinnu, sum var sera misnøgd við viðurskiftini har. Hon sá beinanvegin, tá ið hon koyrdi inn á stovuna, at vinkonan sá so mótfallin út. So bar hon eyga við eitt uppslag á vegginum uppi yvir song hennara. Har stóð: „Gud gevi mær sinnisfrið at góðtaka tað, sum eg ikki kann broyta, og vísdóm til at síggja munin.

Fyri at fáa hana í gongd, setti Joni henni nakrar spurningar, og neiligu svarini vóru har beinanvegin „Tú kanst ikki ímynda tær, hvussu illa tey fara við mær," segði hon. „Starvsfólkini taka sær ikki av mínum trupulleikum, og tey syrgja ikki fyri at venda mær ordiliga um náttina."

Eftir eina góða løtu slapp Joni so framat at siga okkurt. Joni mælti henni til at fara og tosa við fyristøðu-kvinnuna ella royna at útvega sær pening at keypa eina betri madrassu fyri. Joni skeyt upp, – at tær báðar skrivaðu eitt bræv og slógu tað upp yvir song hennara. Har skrivaðu tær, hvussu hon vildi verða vend um náttina. Vit kundu eisini skrivað til lækna hennara um hetta, fyri at fáa eitt úttalilsi um heilsu-trupulleikar hennara. Vit kundu fáa familjuna upp í hetta. Har vóru nógvir møguleikar.

Men eftir hvørt einasta av hesum uppskotum risti hon við høvdinum. Eftir at Joni í ein hálvan tíma hevði lurtað eftir hennara grundgevingum, gjørdi hon av at tosa beint fram.

Hon peikaði á uppslagið á vegginum og segði: „Hetta seinasta hálva árið hevur tú góðtikið tað, sum tú ikki kanst broyta. Tú hevur ligið her í songini uttan at gera nakað við tað. Men nú mást tú fara undir annan part av bønini. Tær manglar mót til at broyta tað, sum tú kanst broyta. Tað er rós vert at góðtaka royndir, men minst til, at Gud gevur okkum tær, fyri at skapa broytingar.

# Hetta broytti mítt bønarlív

Er tað nakað, sum ein pastorur ella prestur veit, so er tað, at bøn er týdningarmikil. Eg visti tað, og tí bað eg. Ikki so nógv av tí at eg vildi, men mest av tí at eg visti, at eg átti. Men nú er øðrvísi. Nú eru mínar dagligu løtur við bøn og Bíbliu vorðnar mínar dýrastu løtur, og eg hugsaði mær at luta við tær, hvat ið hendi, fyri kanska at kunna hjálpa tær.

Eg hevði skift út tørvin á Gudi við okkurt annað í mínum lívi. Millum annað hjálpti nakað mær, sum C. S. Lewis hevur sagt: „Søga menniskjans er ein long andstyggilig frásøgn um, hvussu vit royna at finna eydnuna í onkrum øðrum enn í Gudi.“

Sum menniskju royna vit at gerast eydnusom. Gud hevur skapt okkum soleiðis, so einki skeivt er í tí; men ætlan hansara var, at hann skuldi vera okkara kelda. Tí gerst tað skeivt, tá ið vit fara at gera okkum tengd at gávunum í staðin fyri gevaranum. Tá ið vit skifta Gud út við okkurt annað, fáa vit tað, sum Bíblian kallar avgudar.

Tað var tað, eg sá. At eg hevði avgudar í lívi mínum, og teir liggja enn og lúra. Ein avgudur er okkurt, sum fyribils fyllir tann tørvin, sum bara Gud kann nøkta.

Vit hugsa, at avgudar eru í Afrika og India, og tað eru teir; men eg havi verið har, og eg ivist onga løtu í, at talið á avgudum er mangar ferðir størri í Vesturheiminum enn í triðja heiminum. Her tykist tað, sum tað eru fleiri hundrað ting, sum vit fyrst skulu royna, at vita um tey gera okkum eydnusom, áðrenn vit royna Gud.

Eg plagi at siga, at okkara avgudar eita: Eg vil hava viðurkenning. Eg vil hava framgongd. Eg vil vera væl umtóktur. Eg

vil avrika. Eg vil vera í miðdeplinum. Og listin kundi verið nógv longri av tingum, sum vit heldur taka enn Gud, fyri at gerast eydnusom.

Eg hevði skift Gud um við tørvin fyri at hava framgongd í kristnari tænastu! Sjálvt ein kristin tænasta kann gerast eitt endurgjald fyri felagsskapin við Kristus! Eg merkti tað, tí eg kendi meg nøgdan, tá ið alt gekk væl, og argan og smásáran, tá ið illa gekst. Synd er í veruleikanum einki annað enn at líta á seg sjálvan staðin fyri at líta á Gud. Jesus segði: „Syndin er, at teir ikki trúgva á meg.“ (Jóh. 16,9) Tað var mín trupulleiki. Eg hevði roynt at fingið í lag mína egnu lukku, uttan Gud sum mína fyrstu keldu. Tá ið eg skilti tað, vendi eg um og játtaði synd mína. Bíblian sigur, at Gud býr hjá teimum, sum hava eitt sundurbrotið hjarta (Sálm. 34,19), og eg kendi, at hann var nær á ein nýggjan hátt.

Bøn er felagsskapur við Gud. Nú er hann vorðin mín kelda, og tí loysi eg trupulleikarnar á ein nýggjan hátt.

*Effie Campbell* umsetti.

# Eg vil bønhoyra

*Hini eymu og fátæku leita eftir vatni og finna einki, tunga teirra brennur av tosta, men eg vil bønhoyra tey, Ísraels Gud vil ikki siga tey burtur (Jes. 41,17).*

Tey ganga um oyðimerkur, har tey ikki finna nakað vatn til troystar og styrkis, har allar keldur tykjast at vera upptornaðar.

Har roynt verður at fáa troyst, fæst eingin, men allastaðni hjartasorg. Og enntá í Harrans halgidómi, tó at biðið verður og grátið, einki náðibrá, eins og Gud var umbroyttur til ein ræðuligan fígginda, sum Job helt: „Hann tveitti meg út í rununa, eg eri vorðin eins og mold og øska. Eg rópi til tín, men tú svarar ikki, tú stendur har, men gevur mær ikki far.“ (Job. 30,19–20).

Men Harrin hjálpti um síðir Job og gjørdi enda á fangaskapi hansara – t.e. vanlukku hansara, brøður hansara og systrar hansara og øll, sum hann hevði kent fyrr, høvdu samkenslu við honum, komu inn til hansara at troysta hann í hesi vanlukkuni, sum Harrin hevði latið koma yvir hann. Og Harrin vendi

seinni lagnu Jobs. Og alt, sum hann hevði átt, gav Harrin honum tvífalt aftur.

Við hesum skulu tær sálir troysta seg, ið halda sum Job, at Harrin er farin frá teimum. Gud hoyrir bønir teirra. Gud kann als ikki fara frá teimum, tó at tey halda, at soleiðis er. Hann er longu nær í rópi, suffi og longsli, og í myrkri teirra er hann hitt fjalda ljósið, sum einaferð skal glógva í eygum teirra.

*t.* týddi.

# Guds blíða smíl

Á havinum var ein øgiligur stormur. Ferðafólkini gjørdust hjartkipt, tá ið brotini skolaðu inn yvir bógvin. Hetta hendi fyri mongum árum síðani, í seglskipatíðini, og sjóferðir vóru nógv ótryggari enn í dag. Mong fóru at tosa um, at tey vóru í lívsvanda.

Men eitt av ferðafólkunum helt sær fast og hugdi upp móti róðursmanninum, sum stóð bundin við róðrið. Maðurin við rattið bar eyga við tann ræðslusligna mannin og smíltist sissandi ímóti honum. Tá ið ferðamaðurin sá hetta, kreyp hann niður aftur til hini ferðafólkini og segði: „Eg sá róðursmannin, og hann smíltist ímóti mær. Alt er í lagi.“

Hevur tú tað trupult í dag? Lít upp móti himli. Har hómar tú Guds milda smíl ímóti tær. Lær av Stefani. *„Men hann hugdi upp til himmals fullur av heilagum anda og sá Guds dýrd og Jesus standandi við høgru hond Guds.“* (Aps.7,55).

# Tholuck

Tá ið týski gudfrøðingurin Tholuck lá til tað seinasta, segði hann við ein vin: „Undarligt! Øll mín gudfrøði er tódnað saman til nøkur orð. Hvat er tað, eg sigi? Nøkur orð? Nei – til eitt orð. Og hetta orðið er ***Jesus***.“

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 14. okt. | Tekstur: | Matt. 6,12 & 18,21-35; | bíbliuorð: | Ef. 4, 32d |
| 21. okt. | Tekstur: | Matt. 6,13a + 4,1-11; | bíbliuorð: | 2. Tess. 3,3 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74




*Nr. 22* *28. oktober 2018* *78. árg.*

# Ærusjúka

*Hvussu kunnu tit trúgva, tit sum taka ímóti heiðuri hvør av øðrum.* *Jóh. 5,44.*

Ærusjúka er ein ókrútsplanta, sum torfør er at fáa slitið upp við rót. Lærusveinarnir vóru ærusjúkir; teir kegladust um, hvør teirra var størstur, hetta kjakið helt á líka til seinasta kvøldið saman við Meistaranum. Í Korinth treivst ærusjúkan væl. Og kirkjuliðinum í Filippi varð lagt eina við onki at gera av sjálvsøkni eftir tómari æru.

Í okkum øllum er ein trongd eftir, at onnur skulu leggja merki til okkara. Ærusjúkan kann vera blandað við ymsum motivum. Hjá konuni hjá Zebedeusi, sum vildi tryggja synunum teir fremstu sessirnar í flokkinum hjá Jesusi, er ærusjúkan knýtt saman við onkrum góðum. Lítillæti og ærusjúka kunnu vera flættað saman, og vit halda tað vera óført, um ærusjúkan kann bera úrslit við sær; „tað er søtari enn jarðber við róma," segði kendi trúboðarin, Johannes Johnson.

Jesus hevur ávarað móti ærusjúku, tí hon er ein planta, sum himmalski faðir okkara ikki hevur plantað. Hvussu kann vinnast á henni. Pætur, sum víst var tann ídnasti, tá ið tosið um fremsta plássið var frammi, fekk ein løst seinasta kvøldið. Um hann varð lektur, vita vit ikki, men hann var ráðaleysur, tá ið tann upprisni spurdi hann: „Elskar tú meg meira enn hinir?" Hann lærdi, at teim eyðmjúku gevur hann náði.

Ærusjúka er ein av teim sterku vitnis-burðunum um ta eitraðu manna-náttúruna. Hvat billa vit okkum inn? Hvussu tora vit at troka okkum fram, fyri at onnur skulu leggja merki

til okkara. Vit, sum eru við undirlutan og ferðast úr synd í synd, vit sum vanvirða Gud við iva okkara og svíkja hvønn einasta dag? Ærusjúka og errinskapur eru ókrútsplantur. Ikki er nóg mikið bara at klippa toppin omanav; tær skulu skrykkjast upp við rót. Niðurløg og eyðmýking eru tveir av hættunum, sum Gud nýtir fyri at drepa ærusjúkuna. Vit mugu aldri gloyma, at „rósurnar vaksa í dali."

# „Fyri pening kann ein fáa alt"

Ja, soleiðis siga mong: „Fyri pening kann ein fáa alt". Nei, tað kann ein so sanniliga ikki. Tú kanst keypa mat, men ikki matar-list. Tú kanst keypa tær dýra song, men ikki svøvn. Tú kanst keypa heilivág, men ikki heilsu. Tú kanst keypa vinir, men ikki vinalag. Tú kanst keypa grá hár, men ikki æru og virðing. Tú kanst keypa tær góðar dagar í friði á eini baðistrond, men ikki ein frið, sum av sonnum hevur nakran týdning. Skalið kanst tú keyp fyri pening, men ikki kjarnuna.

Ein fleirmiljóningur átti son, sum lá fyri deyðanum. Ein dagin segði hann við læknan: „Eg gevi tær 100 dollarar fyri hvønn tíma, tú kanst leingja soni mínum lívið." Læknin hugdi upp á hann við sorgblíðum brosi og segði: „Harri mín, nú eru vit komin hagar, sum dollarar ikki longur hava nakran týdning."

Jú, víst kann nógv keypast fyri pening. Men veruligu lívsvirðini, tey, ið hava týdning líka inn í ævinleikan, tey kunnu ikki keypast fyri pening.

Her er eingin munur á ríkum og fátækum. Tí hesi virði fáast ikki fyri pening. Tað dýrabarasta, ið fáast kann her í lívinum, er tað, ein syndari fær, ið hevur fatað syndanna fyrigeving og tikið ímóti henni. Hetta kann ikki metast í peningi.

Eydna er at hava funnið útav, at henda syndanna fyrigeving kostar einki, men bert er at taka ímóti, annaðhvørt ein er ríkur ella fátækur.

Gud havi lov fyri tað – so kann eg eisini vera við!

*A.J.*

---

Eg havi eina T-skjúrtu. Á henni stendur: PUSH. Bókstavirnir standa fyri: „Pray Until Something Happens." Bið til okkurt hendir. *e.c.* um.

# Krossberin

*Og hann bar sjálvur kross sín. (Jóhs. 19,17).*

Fyrst bar Jesus krossin – síðani bar krossurin Jesus.

Alt jarðarlív sítt var fyri Jesusi at bera ein kross. Tað var ein krossur at ganga millum hinar sjálvgóðu farisearanar, sum als ikki høvdu brúk fyri einum frelsara. Tað var ein krossur at síggja hina líkasælu mannamúgvuna, sum rópaði hosianna, og sum dagin eftir rópaði ***krossfest hann.*** Tað var eisini ein krossur hjá honum at hoyra Pætur við koleldin svørja, at hann kendi ikki Jesus.

Og ein krossur var tað, tá ið ein lærusveinur hansara sveik hann við einum kossi. Og so bar Jesus at enda eisini sjálvur kross sín út á Golgata.

Úti á Golgata løgdu teir krossin slættan og strektu Jesu likam út á honum – so reistu teir krossin – og nú bar krossurin Jesus. Krossurin bar hann í nakrar ræðuligar tímar, tá ið hann upplivdi helvitis kvøl fyri okkara skyld – og so bar krossurin Jesus beint heim í Paradís saman við einum angrandi illgerðarmanni.

Fyrst mugu vit bera krossin. Vit mugu taka upp krossin og fylgja Jesusi eftir – vit mugu fara undir krossins dóm yvir syndir okkara. Men – Gud fái lov – so ber krossurin okkum og heldur okkum uppi í øllum korum. Krossurin ber sjálvur krossberan.

Hetta er lívsins loyndarmál og eydna – eisini hjá okkum!

*t.* týddi.

# Fyri tey miseydnaðu

Í árinum 1957 setti landshøvdingin í statinum Arkansas í USA hermenn á varðhald fyri at forða fyri, at níggju litt børn sluppu at byrja skúlagongd í einum almennum skúla fyri hvít børn. Sjálvandi stóðst nógv rok av hesum, og stjórnin í Washington setti hermenn at fylgja littu børnunum í skúla. Býurin Little Rock gjørdist kendur av tí, sum aftaná kom; men rasumismunurin varð sum frá leið settur úr gildi. Um henda stívrenda landshøvdingan søgdu fólk í tíðini, sum aftaná

kom: „Kanska er tað positivasta, sum sigast kann um hann, at hann misskilti fortíðina, metti samtíðina skeivt og yvirsá framtíðina.“

Eini so eirindarleys minningarorð kunnu óivað sigast um mangar aðrar landshøvdingar. Men eisini tey miseydnaðu eru fevnd av Guds kærleika. Jesus hevur syrgt fyri einum lívi merktum av fyrigeving fyri sjálvt tann ringasta brotsmannin, um vit bara taka ímóti.

Um Jesus segði Paulus ápostul: „Tað veri tí tykkum vituligt, brøður mínir, at í honum er syndafyrigeving boðað tykkum.“

# Ílatin til bardaga

*Havið í øllum førum trúarskjøldurin á lofti, sum tit kunnu vera førir fyri at sløkkja allar gløðandi ørvar frá hinum ónda við; og takið hjálm frelsunnar og svørð andans, sum er Guds orð.*

*Hebr. 6,16–17.*

Andalig krígsførsla krevur yvirnatúrliga styrki fyri at vinna sigur. Paulus nevnir tríggjar lívsneyðugar lutir, sum tú mást hava, um tú skalt hava nakran møguleika. Teir eru, ***trúarskjøldurin, hjálmur frelsunnar og svørð andans.*** Trúgv okkara á Guds natúru er ein verjandi skjøldur, sum ongin ørvur frá tí ónda bítur á. Frelsunnar skjøldur broytir hugsanir okkara og gevur okkum mátt at liva fyri Jesusi. Og Paulus heldur fram „og háttið tykkum ikki eftir hesum heimi; men verðið umskapaðir við endurnýggjan av huga tykkara, so at tit mega fáa at royna, hvat ið er Guds vilji, hitt góða og hugnaliga og fullkomna. (Róm. 12,2). Andans svørð er fyri okkum eitt vápn, sum aldri gerst óhvast, og sum aldri verður ov tungt at reiggja, enntá í tíðum, tá ið møði og mótloysi herja á. Far út í dag, hóast fíggindi okkara bæði lýgur, hóttir, ræðir og roynir at steðga okkum. ***Minst til, at Guds orð er trygt at líta á.***

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 28. okt. | Tekstur: | 1. Kong. 18, 1-46; Opb. 4,11; | bíbliuorð: | Opb. 19,6-7a |
| 4. nov. | Tekstur: | Opb. 21,1-5 | bíbliuorð: | Opb. 21,5 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74